# Gullið endar í Havn

**Fuglfirðingar fingu hevnd fyri steypafinalutapið og tóku samstundis ta seinastu lítlu FM-vónina frá sørvingum. Nú er heilt vist, at føroyameistaraheitið endar í Havn – spurningurin er bara um tað verður Fleyr ella Fram**




*Fram helt lív í FM-vónini, tá teir vunnu í Klaksvík, men tað skal ein sensation til, um tað ikki skulu gerast grannarnir úr Fleyr, sum vinna gullmerkini*

*Mynd: SáH*

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Teir í SÍ høvdu longu áðrenn hetta vikuskiftið ásannað, at føroyameistaraheitið ikki endar í Sørvági í ár, og tað hevur ivaleyst havt sína ávirkan á avrikið hjá teimum á heimavølli móti ÍF sunnudagin. Í øllum førum endaði tað við, at ÍF vann 3-1 og fekk eitt slag av hevnd fyri finalutapið eina viku frammanundan. Hetta var eisini ein heilt annar dystur enn steypafinalan. ÍF vann tvey tey fyrstu settini, sum bæði vóru tøtt. Í triðja setti vendi alt á høvdið, tí SÍ vann ikki minni enn 25-8. Men hesin vørrurin hjá sørvingum rakk ikki langt, tí fjórða sett vann ÍF 25-18. Harvið greiddu fuglfirðingar málsetningin, teir settu sær í byrjanini av endaspælinum, nevniliga ikki at enda aftast. Tað ger Mjølnir, sum dagin fyri hevði tapt 3-0 móti SÍ. Við settúrslitunum 25-12, 25-15 og 25-15 var einki at tosa um í hesum dystinum, sum skuldi verðið leiktur fyrst í hesum mánaðinum, men sum tá bleiv útsettur vegna veður.

Sum heild hevur tað bara gingið niður á bakka hjá mjølnirmonnunum, og síðan ársskiftið hava teir tapt hvørjaferð. Vit skulu heilt aftur til 8. desember, tá teir vunnu á Kambsdali, fyri at finna seinasta sigurin hjá Mjølni í bestu mansdeildini. Sunnudagin høvdu teir vitjan av Fram, sum greiddi sín setning og vann 3-1 við settúrslitunum 25-21, 25-15, 23-25 og 25-20. Hevði Mjølnir vunnið, høvdu teir samstundis gjørt Fleyr til føroyameistara, men nú sleppa teir í Fleyr sjálvir at avgera tað. Næsta sunnudag verður dystur í Sørvági millum SÍ og Fleyr, og vinna sørvingar her, verður trýstið á Fleyr liggjandi til síðsta dystin. Men hann er heima móti Mjølni, og vinnur Fleyr ikki tá, verður tað tað mest óvæntaða av fleiri óvæntaðum úrslitum í manskappingini, sum hevur verið bæði spennandi og merkisverd.

**Úrslitini um vikuskiftið**

Mjølnir-SÍ 0-3
(12-25, 15-25, 15-25)
Mjølnir-Fram 1-3
(21-25, 15-25, 25-23, 20-25)
SÍ-ÍF 1-3
(21-25, 23-25, 25-8, 18-25)

**Dystir eftir:**
12. ÍF-Mjølnir
15. SÍ-Fleyr
18. Fram-ÍF
09.03. Fleyr-Mjølnir

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild kvinnur**

| | | dystir | v - t | vunnin sett | tapt sett | +/– sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 14 | 13 - 1 | 40 | 10 | 30 | 19 |
| 2 | Mjølnir | 14 | 10- 4 | 34 | 19 | 15 | 15 |
| 3 | ÍF | 14 | 5 - 9 | 23 | 32 | -9 | 7 |
| 4 | Dráttur | 15 | 5 - 10 | 27 | 34 | -7 | 6 |
| 5 | Fleyr | 15 | 3 - 12 | 12 | 40 | -28 | 5 |

**Meistaradeild menn**

| | | dystir | v - t | vunnin sett | tapt sett | +/– sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fleyr | 14 | 10 - 4 | 35 | 22 | 13 | 15 |
| 2 | Fram | 15 | 10 - 5 | 36 | 25 | 11 | 14 |
| 3 | SÍ | 15 | 9 - 6 | 35 | 23 | 12 | 12 |
| 4 | ÍF | 14 | 4 - 10 | 19 | 36 | -17 | 8 |
| 5 | Mjølnir | 14 | 3 - 11 | 17 | 36 | -19 | 3 |

# Dómarar høvdu høvuðsleiklutin

**Bárður B. Mikkelsen og hinir í Holte taptu leygardagin í Odense, men dysturin varð nógv merktur av vánaligari døming, sum rakti bæði liðini**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Holte IF við Bárði B. Mikkelsen tapti dystin móti DHG Odense leygardagin, men tað vóru fyrst og fremst dómararnir, sum fingu umrøðu aftaná dystin.

Dómararnir gjørdu nógv mistøk báðar vegir undir dystinum, og venjararnir hjá liðunum tosaðu leingi saman aftaná dystin, har teir ivaðust í, um teir skuldu kæra dømingina til danska flogbóltssambandið DVBF. Til síðst samdust teir um at geva DVBF eina munnliga kæru.

Sjálvur dysturin var bæði javnur og spennandi, men endaði við 3-1 sigri til DHG. Settúrslitini vóru 25-23, 18-25, 25-19 og 25-23. Tað var serliga í álopspartinum, at DHG hevði munin, og sigurin var í síðsta enda væl uppiborin.

Bárður hevur alla vikuna verið plágaður av pínu í vinstra knænum, og hann fekk tí ikki tað stóra burturúr leygardagin. Undir vánaligum umstøðum hevði hann neyvan verið við, men hin hevarin hjá Holte hevur eisini trupulleikar við knøunum, so noyddist føroyski landsliðsleikarin at koma inn fyri hann nakrar ferðir í dystinum.

Møguleikin hjá Holte fyri at koma í hálvfinalurnar er enn til staðar, men so skulu teir ikki tapa ov nógvar dystir afturat. Komandi leygardag spæla teir úti móti Middelfart VK. Tað hjálpti heldur ikki søkini hjá Holte, at Gentofte Volley heldur óvæntað vann 3-1 móti Skovbakken Volley, tí nú hava Holte og Gentofte sama stigatal.



# Hull stórkiksaði

**Julian Johnsson var á beinkinum alla tíðina, tá Hull avrikið var eitt tað vánaligasta í hesum kappingarárinum**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Síðani Julian Johnsson síðsta summar flutti úr Sogndal og til Hull hevur hann átt fast pláss á besta liðnum. Leygardagin var hann kortini ikki millum teir fyrstu ellivu. Hull venjarin, Brian Little, setti Julian Johnsson á beinkin, og har var hann sitandi allar 90 minuttirnar.

Og sjónin var einki serlig. Eftir dystin helt Brian Little, venjarin hjá Hull, at avrikið mundi vera eitt tað vánaligasta í hesum árinum. Macclesfield Town vann 1–0, og sambært Hull venjaranum var tað væl sloppið. Gestirnir sendu fleiri ferðir í træverkið, og tað hevði einki forgjørt verið í tí, um teir høvdu fingið tvey ella trý mál afturat.

Málið fingu teir tá 2. Hálvleikur var fimm minuttir gamal. Síðstu løtuna vóru teir á heimaliðnum undirmannaðir, tí ein av vónsviknu monnunum hevði hevnt seg og harvið givið dómaranum orsøk at vísa honum reyða kortið.

Vónirnar hjá Hull at røkka triðja plássinum, sum ber beinleiðis uppflyting við sær, kámast í hvørjum. Men enn er góður møguleiki at røkka endaspælinum um uppflytingarpláss. Skal hetta eydnast, so er neyðugt, at aðrir bollar koma á suppuna í komandi dystunum.

Í hesi vikuni skal Hull spæla tvær ferðir á útivølli, og tað skuldu verið møguleikar fyri, at Julian Johnsson skjótt fór at endurvinna miðvallarplássið. Fyrri dysturin verður ímóti Rockdale, og leygardagin skulu teir spæla í Swansea.

## Hollendska toto-deildin

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Excelsoir + | 24 | 15-7 - 2 | 58 | 21 | 37 | 52 |
| 2 | FC Zwolle | 24 | 15-5 - 4 | 44 | 26 | 18 | 50 |
| 3 | RBC Roo'daal | 24 | 14-5 - 5 | 54 | 28 | 26 | 47 |
| 4 | Emmen | 23 | 13-6 - 4 | 38 | 22 | 16 | 45 |
| 5 | ADO Den Haag | 23 | 11-6 - 6 | 35 | 24 | 11 | 39 |
| 6 | Cambuur/L. + | 24 | 11-5 - 8 | 36 | 26 | 10 | 38 |
| 7 | BV Veendam | 22 | 10-6 - 6 | 37 | 32 | 5 | 36 |
| 8 | FC Volendam | 24 | 9 - 6 - 9 | 44 | 36 | 8 | 33 |
| 9 | Dordrecht '90 | 23 | 8 - 7 - 8 | 44 | 41 | 3 | 31 |
| 10 | Haarlem | 23 | 8 - 6 - 9 | 27 | 31 | -4 | 30 |
| 11 | Storm/Telstar | 24 | 7 - 8 - 9 | 38 | 32 | 6 | 29 |
| 12 | Heracles A. | 24 | 8 - 4 -12 | 35 | 40 | -5 | 28 |
| 13 | Helmond Sp. | 24 | 6 - 9 - 9 | 25 | 37 | -12 | 27 |
| 14 | G.A. Eagles | 24 | 6 - 8 -10 | 32 | 42 | -10 | 26 |
| 15 | VVV | 24 | 8 - 2 -14 | 40 | 54 | -14 | 26 |
| 16 | MVV | 24 | 5 - 6 -13 | 32 | 47 | -15 | 21 |
| 17 | Eindhoven | 24 | 3 - 6 -15 | 34 | 61 | -27 | 15 |
| 18 | Top/Oss | 24 | 3 - 4 -17 | 19 | 72 | -53 | 13 |

Perioduvinnarnari eru merktir »+«
Føroyskir leikarar: Súni Olsen (FC Zwolle)

# Eddie var tættur sum fløskan

**Leygardagin var Jákup Mikkelsen á beinkinum, tá Molde vann 4–0 ímóti svenska Ørgryte**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Jákup Mikkelsen var aftur á beinkinum, tá Molde leygardagin spældi triðja dystin í venjingarkappingini í La Manga. Mótstøðuliðið var svenska Ørgryte, og úrslitið var 4–0, eftir at tað í hálvleikinum hevði verið málleyst.

Eddie Gustafssson vardi Molde málið. Tað verður ikki sagt so nógv um avrikið hjá málverjanum, men sjálvandi telur tað rætta vegin hjá einum málverja, tá hann megnar at fara av vøllinum, uttan at mótstøðumenninir hava skorað hjá honum.

Á heimasíðunum verður einki sagt um avrikið hjá Molde málverjanum uttan tað, at hann við longum útkasti stóð fyri uppspælinum til 2–0 málið.

Rosenborg spældi leygardagin 4–4 ímóti russiska Anzhi. Tá tað restaðu tíggju minuttir, var Rosenborg á odda 4–1.

Endaliga úrslitið í bólkinum var, at Rosenborg, Ørgryte og Molde øll fingu fýra stig, meðan Anzhi fekk trý stig. Rosenborg hevði besta málmunin, og teir skulu spæla hálvfinalu. Hini liðini í hálvfinaluni eru Viking, Helsingborg og Lillestrøm. Molde skal spæla tveir dystir afturat. Annar verður spældur í dag ímóti Halmstad, og tann seinni verður fríggjadagin ímóti AIK Solna.

## Enska 3. deild

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Plymouth | 34 | 22 - 7 - 5 | 50 | 24 | 26 | 73 |
| 2 | Luton | 34 | 19 - 6 - 9 | 66 | 43 | 23 | 63 |
| 3 | Mansfield | 33 | 18 - 6 - 9 | 54 | 36 | 18 | 60 |
| 4 | Scunthorpe | 35 | 15 - 11- 9 | 63 | 44 | 19 | 56 |
| 5 | Rochdale | 34 | 15 - 11- 8 | 48 | 39 | 9 | 56 |
| 6 | Hull C. | 35 | 15 - 10- 10 | 48 | 35 | 13 | 55 |
| 7 | Shrewsbury | 35 | 15 - 9 - 11 | 51 | 42 | 9 | 54 |
| 8 | R&D | 35 | 14 - 10- 11 | 45 | 42 | 3 | 52 |
| 9 | Cheltenham | 31 | 13 - 12- 6 | 45 | 35 | 10 | 51 |
| 10 | Hartlepool | 34 | 14 - 8 - 12 | 53 | 36 | 17 | 50 |
| 11 | Kidderm. | 33 | 13 - 7 - 13 | 40 | 35 | 5 | 46 |
| 12 | Exeter | 33 | 12 - 8 - 13 | 35 | 50 | -15 | 44 |
| 13 | Macclesfield | 35 | 11 - 10- 14 | 32 | 41 | -9 | 43 |
| 14 | Darlington | 35 | 11 - 9 - 15 | 45 | 54 | -9 | 42 |
| 15 | Swansea | 35 | 11 - 9 - 15 | 43 | 52 | -9 | 42 |
| 16 | Southend | 34 | 11 - 8 - 15 | 40 | 44 | -4 | 41 |
| 17 | Carlisle | 32 | 9 - 11- 12 | 37 | 38 | -1 | 38 |
| 18 | Oxford Utd. | 35 | 9 - 11- 15 | 43 | 47 | -4 | 38 |
| 19 | Bristol R. | 34 | 10 - 8 - 16 | 33 | 42 | -9 | 38 |
| 20 | Lincoln C. | 33 | 9 - 11- 13 | 35 | 46 | -11 | 38 |
| 21 | York | 33 | 10 - 8 - 15 | 40 | 55 | -15 | 38 |
| 22 | Torquay | 35 | 8 - 11- 16 | 33 | 54 | -21 | 35 |
| 23 | Leyton O. | 33 | 8 - 8 - 17 | 43 | 58 | -15 | 32 |
| 24 | Halifax | 34 | 5 - 11- 18 | 23 | 53 | -30 | 26 |

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (Hull C.)

# Vejle vánaliga síðstu roynd

**Málverjin hjá Christian Høgna og teimum varð skaddur í innandura dystinum ímóti AAB**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Tað royndist stak illa, tá nýggja felagið hjá Christian Høgna Jacobsen spældi síðsta venjingardystin, áðrenn tað komandi vikuskifti verður farið undir aftur landskappingina í Danmark.

Vejle var sunnudagin í Aalborg, og teir á heimaliðnum vóru ikki petti gestablíðir. AAB vann 4–0, eftir at hálvleiksstøðan hevði verið 2–0. Fyrrverandi danski landsliðsspælarin Mikkel Beck hevur júst gjørt leiguavtalu við AAB, og hann vísti beinanvegin, at hann framvegis hevur nøs fyri álopsspælinum. Hann skoraði sjálvur eitt mál og legði upp til tvey.

Vetrarveðrið í Danmark hevur havt við sær, at tað bara eina viku undan kappingarbyrjan ikki hevur borið til at spælt venjingardystir á grasvallunum. Hetta hevur havt við sær, at fleiri feløg eru flýdd av landinum at spæla venjingardystir. Eitt nú hevur Brøndby um vikuskiftið verið í Spania, og í gjárkvøldið skuldu Todi Jónsson og liðfelagarnir hjá honum í FCK spæla venjingardyst í Manchester ímóti City, sum fyri stuttum keypti Niclas Jensen úr FCK.

**Skaddur á graslíki**

Vejle og AAB spældu sunnudagin í nýggja stóru høllini í Aalborg, sum verður nevnd Gigantium. Graslíki er á vøllinum, og undirlagið var orsøk til, at Vejle málverjin varð skaddur.

Í Vejle hava tey fegnast nógv um, at tað fyri stuttum eydnaðist at fáa leigusáttmála við Glasgow Rangers, so málverjin Jesper Christiansen í vár skuldi spæla við Vejle. Men nú er hann skaddur. Longu undan dystarbyrjan sunnudagin stóð hann fastur í graslíkinum. Øklaknúturin varð skaddur, og tað er óvíst, um málverjin verður tøkur, tá Vejle sunnudagin fer at spæla í Lyngby.

Fyri sjálvsálitið hjá Christian Høgna Jacobsen og liðfeløgunum kom tað ikki væl við, at teir taptu stórt í Aalborg. Teir mugu í vikuni troysta seg við, at tá síðsta royndin er vánalig, so verður ofta tikið til, at frumframførslan plagar at verða góð!

# Stórsigur til Zwolle

**Súni Olsen fekk seinastu átta minuttirnar við, tá Zwolle tók seg enn nærri oddinum**

HOLLAND
*Jákup Mørk*

Tað gongur við fúkandi ferð hjá FC Zwolle í næstbestu hollendsku deildini. Um vikuskiftið vunnu teir enn einaferð, og eftir at tað fleiri ferðir á rað bert hevur verið lítil munur á, ivaðist eingin eftir heimadystin móti Dordrecht.

Zwolle vann ikki minni enn 6-1 eftir 4-0 í hálvleikinum, og í hollendsku miðlunum stendur, at talan var um klassamun.

Súni Olsen, sum annars hevur verið nógv við í ár, hevur eftir sjúkralegu havt ilt við at komi inn aftur í hópin, men hesa ferð kom hann so á vøllin seinastu sjey minuttirnar.

Sigurin hjá Zwolle gjørdist ikki verri av, at oddaliðið, Excelsoir, púrasta óvæntað mátti taka til takkar við javnleiki, tá Go Ahead Eagles var á vitjan.

Nú eru bert tvey stig ímillum tey bæði fremstu liðini, og sum rákið hevur verið hjá Zwolle síðani vetrarsteðgin, so er væl hugsandi, at teir um ikki so langa tíð fara at lyfta seg upp á ovastu rók í deildini.